**27-12-2005 AK/jm**

**Kunning um verkætlanir játtaðar av fiskivinnuroyndum 2006**

Fiskimálaráðið hevur gjørt av at játta pening til 13 nýggjar verkætlanir av játtanini Fiskivinnuroyndir. Harumframt er framhaldandi játtan latin til 11 verkætlanir, sum eru byrjaðar í 2004 og 2005, sí fylgiskjal 1.

Seinnu árini hevur verið dentur lagdur á at fáa vinnufyritøkur at luttaka í verkætlanini.

Í ár hava vinnufyritøkur fingið 44% av játtanini, meðan almennir stovnar hava fingið 27%. PhD verkætlanir hava fingið 16% av játtanini. Granskingarkjarnurnar, sum Fiskimalaráðið setti á stovn fyri 2½ árum síðani, hava fingið 13% av játtanini.




Samanborðið við 2004 og 2005 sæst, at vinnufyritøkur fáa játtað knappa helvt av peninginum í 2006, og er hetta í tráð við tey endamál, vit hava arbeitt eftir seinnu árini. Játtanin til PhD verkætlanir og til verkætlanir hjá teim 3 kjarnunum (biotøkni, framleiðslutøkni og reiðskapstøkni) er økt fyri 2006. Játtanin til aðrar "almennar stovnar" er minkandi seinastu 3 árini.



## Fylgiskjal 1: Verkætlanir 2006

| Id. | Navn | Játtað 2006 |
|---|---|---|
| | **Framhaldandi verkætklanir** | **1.567.500** |
| 20032050 | Merking av havtasku | 170.000 |
| 20032101[1] | Útbreiðsla og atferð hjá laksi | 55.000 |
| 20032102[2] | Prikkafiskur | 150.000 |
| 200401947 | Rúsureiðskapur | 200000 |
| 200401946 | Gagnnýtsla av livur | 50.000 |
| 200401928 | Heilsuárin av sjómati | 216.000 |
| 200401880 | Phd in economic science | 70.000 |
| 200401925 | Nýskapan í Fiskivinnuni | 169.000 |
| 200401933 | Árinskanningar skjeljar | 277.500 |
| 20032025 | Sjómatartrygd | 125.000 |
| 200401906 | Støddarskiljing av rækjum | 85.000 |
| | | |
| | **Nýggjar verkætlanir** | **3.435.600** |
| 200600029 | Vistfrøðiligur-búskaparligur **myndil** | 400.000 |
| 200600030 | Gulllaksur | 300.000 |
| 200600031 | Kanning av **koralløkjum** | 302.000 |
| 200600032 | Innspræning av **protein-isolat**i í fisk | 391.000 |
| 200600033 | Collagen and **Gelantin** from Faroese Fish - Phd | 300.000 |
| 200600034 | PhD-Menning av stórmeskaðum flótitrolum | 45.000 |
| 200600035 | **Digital** National Traceability System | 500.000 |
| 200600036 | Litur á havtaskugørnum | 75.000 |
| 200600037 | Saltfiskur - minimera vekttap | 350.000 |
| 200600038 | Góðskumeting av ráfiski | 440.000 |
| 200600039 | 3-síðað botntrol | 170.000 |
| 200600040 | Nýgransking og útvikling av **Injector** trolhurðum | 162.600 |

| Játtanarbýtið í kr. | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|
| Vinnufyritøkur | 2.045.005 | 2.424.500 | 2.185.100 |
| PhD | 0 | 378.000 | 800.000 |
| Granskingarkjarnurnar | 481.250 | 450.000 | 641.000 |
| Almennir stovnar | 2.453.750 | 1.772.000 | 1.377.000 |
| | 4.980.005 | 5.024.500 | 5.003.100 |

[1] Fyrr 2003/4
[2] Fyrr 2003/3